

# Posta Stamps
Føroyar

Nr. 28
Apríl 2016

ISSN 1603-0036

**Nýggjar frímerkjaútgávur:**

- Toskaskræða
- Føroysk klæðir
- Jesus úr Nasaret
- Frankeringsmerkini 2016

Posta
FAROE ISLANDS



# Svanbjørg Manai 40 ára starvsdag

Tey munnu vera fá, ið ikki hava fingið við, at Posta í ár kann hátíðarhalda sín 40 ára dag. 1. apríl 1976 varð føroyska deildin hjá Post Danmark loyst frá stovninum og gjørdist okkara egna Postverk Føroya, seinni Posta.

Men javngongd við ársdagin hjá stovninum, er søgan um karismatiska stjóran á frímerkjadeildini, Svanbjørg Manai, sum eisini hevur 40 ára starvsdag tann 1. apríl. Hon hevur nevniliga verið við frá fyrstu byrjan – og er við árunum vorðin meira ella minni samgildin við virkið.

Tá Postverkið í sínari tíð skuldi stovna nýggju frímerkjadeildina, varð tann unga Svanbjørg Manai úr Havn 'headhuntað' fyri sín málkunnleika. Nýggja deildin hevði brúk fyri málkønum fólki til kundatænastuna – og Svanbjørg varð sett í starv saman við tveimum øðrum. Fyrstu tíðina sum tímalønt – hon hevði ikki ætlanir um at vera verandi í starvinum. Hóast táverandi starvsfólkastjórin, A. G. Nielsen, hvønn mánað, tá lønin varð útgoldin, spurdi Svanbjørg, um hon ikki vildi gerast fastlønt, segði hon nei takk.

Orsøkin til at Svanbjørg helt seg aftur var, at hon í roynd og veru bara hevði ætlanir at vera heima stutta tíð. Hon hevði frammanundan búð í Týsklandi, Fraklandi og Norra og ætlaði sær út aftur at ferðast, áðrenn hon tók við føstum starvi. Tað ljóðar rættuliga stuttligt fyri okkum, ið hava fylgt Svanbjørg millum ár og dag. Hon man vera ein av teimum føroyingum, ið hevur ferðast mest runt um í heiminum - í júst arbeiðsørindum. Tað var leingi sagt í skemti, at ringdi man til Svanbjørg, visti man aldrin hvørjum landi hon svaraði frá.

Frímerkjadeildin var longu frá byrjan ein nútímans fyritøka. Við fyrsta stjóranum, Jørgen Gunnarson, sum júst var heimkomin úr USA, varð EDV tikið í nýtslu í kundatænastuni. Menningin helt fram, tá Knud Wacher tók við leiðsluni. Kundarøktin hjá frímerkjadeildini var frammanfyri sína tíð í Føroyskum høpi – og deildin legði stóra orku í søluarbeiði, við at luttaka í framsýningum og tiltøkum runt um í heiminum. Og tað fall Svanbjørg í lut, saman við øðrum, at umboða frímerkjadeildina úteftir. Hon, ið ikki vildi setast í fast starv orsakað av ferðaætlanum, var áhaldandi á ferð kring heimin í arbeiðsørindum.

Í 1986 var ein rættulig søludeild sett á stovn á frímerkjadeildini – og Svanbjørg varð sett sum leiðari. Saman við stjóranum á frímerkjadeildini, tí líka so karismatiska Knud Wacher, og stjóranum í Postverk Føroya, Esbern Midjord, var hon partur av einum symbiotis-





Tey 40 árini Svanbjøg hevur starvast í postverkinum hevur hon verið á mongum frímerkjaframsýningum kring um í heiminum.

kum sparring-toymi. Wacher var nýtíðar bureaukraturin og leiðarin, ið tók sær av rakstri og fyrisiting, men ikki brýggjaði seg serligt um ferðing og umboðan. Svanbjørg gjørdist tí andlit og umboð fyri frímerkjadeildina úteftir. Fram til 1998, tá Midjord fór frá vegna aldur, skipaðu tey fyri myndevni, framleiðslu og marknaðarføring av frímerkjunum.

Samstarvið við Knud Wacher helt fram – og tær leiðreglur tey komu fram til, eru framvegis galdandi fyri føroyskar frímerkjaútgávur. Hvørt frímerki skal siga eina søgu og virka sum ein lítil gluggi inn í føroyska mentan, søgu og viðurskifti annars. Søluhátturin er útvendur og dentur verður lagdur á umboðan úti í heimi.

Tá Wacher legði frá sær í 2006, avloysti Svanbjørg hann í stjórasessinum. Hesa tíðina vóru umfatandi umleggingar framdar – stovnurin Postverk Føroya varð til partafelagið Posta. Hetta var eitt ókyrt tíðarskeið. Orsakað av broyttum fortreytum fyri postflutning yvirhøvur, var neyðugt við umfatandi umleggingum og rationalisering – og nýggja fyritøkan hevur nú funnið sína legu sum nútímans logistikfyritøka og frímerkjaútgevi.

Og í ár kann Svanbjørg Manai hátíðarhalda 40 ára starvsdagin saman við Posta. Tað hava verið hendingarík ár fyri gentuna, ið ikki vildi í fast starv vegna ferðahug. Við árunum man hon tilsamans hava ferðast fleiri ferðir kring jarðarknøttin - samstundis sum hon hevur verið undangongufólk millum føroyskar kvinnur, í sínum eginleika sum leiðari uttanfyri siðbundin kvinnustørv. Men kenna vit hana rætt, hugsar hon ikki stórvegis um tað – Svanbjørg hevur enn, sum fyrr, eyguni fest á sjónarringin.

Til lukku við teimum 40 starvsárunum, Svanbjørg! Vónandi liggja mangar og áhugaverdar ferðir fyri framman!

*Anker Eli Petersen*







FO 834 Royndarprent

# Toskaskræða á frímerkjum

## Fyri fyrstu ferð nakrantíð

Viðhvørt lenda uppgávur á mínum skriviborði, ið fáa meg at sita sum kánus. Kreativ verk, so óvanlig og tó so uppløgd, at man brosandi ristir á høvdinum og mutlar: "Sjálvandi! Hví havi eg ikki hugsað um hatta fyrr?"

Hesa kensluna fekk eg herfyri, tá Posta heitti á meg um at skriva eina lítla grein um teirra nýggju frímerki, sum – og tað var her eg sat sum kánus – eru gjørd av toskaskræðu.

"Toskaskræða," hugsaði eg fyri mær sjálvum, "hvussu sær eitt sovorðið verk út?"

Men mítt ivasemi varð brátt fyri skommum, tá eg sá frímerkini. Tey vóru í grundini sniðgivin sum frímerki flest, við teksti, taksti og einari lítlari skraveraðari tekning av meistaragravørinum Martin Mörch. Men har steðgaði so líkheitin. Á hvørt av frímerkjunum var ein ferhyrntur lepi av toskaskræðu límaður. Slettis ikki gráur og keðiligur, sum eg, skomm at siga frá, hevði óttast. Í staðin var skræðan ótrúliga vøkur og mynstrað - við næstan metalliskum litbrøgdum, ið broyttust alt eftir hvørjum vinkli man sá hana frá. Við at hyggja nærri eftir fleiri dømum kundi eg staðfesta, at øll frímerkini eru ymisk – nakað ið frímerkjaútgevarar annars ansa væl eftir ikki skal henda.

Hvussu er og ikki, so útgevur Posta tey vakrastu frímerkini í september, við skræðu frá toski fiskaður undir Føroyum og skorin á fiskavirkinum Nevið á Toftum. Skræðan er síðani garvað á Atlantic Leather í Íslandi og límað og prentað hjá Cartor í Fraklandi.

Atlantstoskurin (Gadus morhua) er oftast uml. ein metur langur, men kann koma heilt upp á tveir metrar. Hægsta vekt er uml. 94 kilo. Toskurin kann blíva upp til 25 ára gamal.

Toskurin finst báðumegin Atlantshav, frá Novaja Semlja í Barentshavinum, yvir Svalbard og Jan Mayen og oman í Biskayavíkina. Hann finst eisini í Norðsjónum og Eystrasalti. Atlantstoskurin er vanligur á havleiðunum við Føroyar, Ísland og Grønland – og framvið amerikansku eysturstrondini frá Labrador í norði til North Carolina í suðri.

Toskurin er vanliga grábrúnur, gulbrúnur um ryggin og niður á síðuna, við gráum ella brúnum blettum og einari ljósari strípu eftir síðuni. Búkurin er hvítur ella heilt ljósagráur.



*Toskur*
*Mynd: Maria Olsen*

Toskurin kann tó eisini hava onnur litbrøgd, t.d. myrkabrúnur ella reyðbrúnur, um hann heldur til í tara.

Toskur er eftirspurdur fyri fína kjøtið - serliga føroyski toskurin ið hevur feitari kjøt og ikki so mjølvutur og turrur sum toskur aðrastaðnis.

Hóast tað síðan heimsbardagan ikki hevur verið serliga vanligt at garva fiskaskræðu, er tað eitt aldargamalt kynstur. Dygdin av skræðu er sjálvandi ymisk alt eftir fiskaslagi, men vælgarvað leður av toski, laksi ella steinbíti er ofta sterkari enn vanligt oksaleður.

Støddin á skræðuni hevur gjørt, at hon oftast hevur verið nýtt til minni brúkslutir, sum t.d. skógvar, taskur, pungar og urreimar. Men verða stykkini seymað saman, kann skræðan eisini nýtast í klædnaídnaðinum og til at klæða innbúgv við. Nútímans sniðgevar fáa meir og meira eyguni upp fyri vakurleikanum og praktisku nýtsluni av skræðu – og nýta hana, umframt tað longu nevnda, til eitt stórt úrval av brúkslutum, t.d. smúkkur, belti, bókbinding og myndakollagur.

Tað er ein vaksandi áhugi fyri at gagnnýta fiskin sum best, so komandi tíðina fara vit helst at síggja størri gagnnýtslu av skræðu. Hetta er ikki avmarkað til garvaða fiskaskræðu, men fevnir enn breiðari – í ídnaðarframleiðslu av fiskagelatinu, ið kann brúkast í matframleiðslu líka so væl sum í hátøkni, sum t.d. elektronikki og optikki. Harafturat kunna eggjahvítaevni í skræðuni nýtast í føðiídnaðinum og av heilsuídnaðinum.

Tað eru bara ímyndingarevnini ið seta mørk fyri gagnnýtsluni av okkara ríkastu ráwøru, fiskinum. Og beint nú slær Posta í vørr fyri gloymdu dýrgripunum, ið liggja í fjøltáttaðu møguleikunum til gagnnýtslu av fiskinum, við at útgeva serstøk frímerki við teimum vakrastu skræðumynstrum, ið hugsast kunnu.

Anker Eli Petersen







FO 835-836 Royndarprent

# Føroysk klæðir

## Tjóðbúni føroyinga

Eitt ið fremmandafólk flest leggja merki til í Føroyum, er teir mongu føroyingarnir í tjóðbúna til bygdarstevnur og veitsluhald. Menn í knæbuksum og eyðkendu føroysku húgvuni – kvinnur í fótsíðum skjúrti, við vakurt broderaðum fyriklæði og sjali og hartil vøkrum silvurskreyti.

Í roynd og veru er siðurin við tjóðbúna ikki serliga gamal. Búnin hevur røtur í gerandisklæðum í fyrru helvt av 19. øld – og byrjaði av álvara at skilja seg frá gerandisbúnanum í tjóðskaparligu vekingini seint í 1800 talinum. Vanliga heitið, "føroysk klæðir" skal síggjast í mun til hugtakið "donsk klæðir", ið vóru keypt í handli – og nýtist ikki merkja veitsluklæðir. Eftirhondini sum tað gjørdist vanligt at ganga í handilsklæðum, komu siðbundnu føroysku klæðini at standa í einum bólki fyri seg. Tá eg var barn var ikki óvanligt, at eldri menn enn nýttu knæbuksur, troyggju og føroyska húgvu sum gerandisklæði.

Men, sum sagt, við tíðini og serliga við tjóðskaparromantisku rørsluni í 1800 talinum, gjørdust føroysk klæði eftirhondini veitslubúni. Ávísar broytingar frá upprunabúnanum eru framdar og ein ávís standardisering av ávikavist kvinnu- og mansbúnanum, soleiðis at man nú kann tosa um ein veruligan tjóðbúna. Eftir seinna heimsbardaga var siðurin spakuliga við at doyggja út, men seinastu 20 – 30 árini, er hann uppafturtikin, partvís orsaka av vaksandi tjóðskaparkensluni ið vaks fram undir sváru fíggjarkreppuni í nítiárunum.

Vit fara í trimum árligum frímerkjaútgávum at varpa ljós á partar av ávikavist kvinnu- og mansbúnanum.

### Yvirkroppur – kvinnubúnin

Troyggjan á kvinnubúnanum er stutt og trong. Hon er opin framman og hevur breiðan háls. Troyggjan er vanliga reyð við fínum svørtum mynstri, í sjáldsomum føri blá við myrkabláum mynstri. Seinastu árini eru serliga yngru kvinnurnar farnar at gera royndir við øðrum liti, t.d. violettum, grønum ella gulum, bara fyri at nevna nøkur dømi.

Undir troyggjugloppinum framman, bera kvinnurnar eitt sokallað bryst. Brystið var ikki vanligt til hendan búnan fyrr, tað stavar frá stakkinum, gamla veitslubúnanum. Fyrr vóru brystini bundin ella vovin úr ull og síðan tøvd. Men nú á døgum eru tey gjørd úr íløgdum velour ella líknandi klæði. Brystið hevur tvær funksjónir. Fyrra er at javna upp ímóti, tá kvinnan, skulu vit siga, gerst størri í vavi. Onnur funksjónin er at virka sum undirlag fyri silvurskreytinum á búnanum.



Føroyskur búni, framleiddur hjá Marjun Heimá.
Mynd: amyedna.com

Til at snøra troyggjuna at kroppinum, verður ein sokallaður stimi nýttur. Stimin er ein tunn silvurketa, ið rennur gjøgnum mallur á báðum síðum á troyggjugloppinum. Í endanum á stimanum situr ein silvurnál, ein sproti, sum verður festur í troyggjuna. Ein kelda vil vera við, at fyrr gekk stimin bara upp undir bróstini, fyri at gera tey meira sjónlig – men nú gongur stimin vanliga upp á sjálva bringuna.

Um miðjuna bera kvinnurnar eitt breitt svart belti við skreytbúnum silvurspenni. Tað finnast eisini belti, ið eru samansett av ornamenteraðum silvurlutum allan vegin runt.

Ovast á brystinum bera kvinnurnar eina stóra skreytbúnað brosju, ið verður nýtt til at halda turriklæðnum upp á pláss. Brosjan og beltisspennið skulu helst hóska saman.

Yvirhøvur hevur silvurskreytið stóran týdning fyri búnan. Tað finnast kvinnur, ið byrja at samla upp á einstaku lutirnar longu tá døturnar eru smáar. Silvurskreytið gongur eisini ofta í arv frá móðir til dóttur.

Sniðgevingin av skreytinum er ymisk – og seinastu árini eru eisini føroysk sniðmynstur komin á marknaðin.

**Yvirkroppur – mansbúnin**

Undir klæðunum eru menn ílatnir hvíta skjúrtu. Uttan á skjúrtuni bera teir vest við seks silvurknappum, tveimum smáum lummum og skrýddir við broderaðum blómumyndevni. Vesturin er antin reyður ella svartur framman. Tað finst eisini eitt hvítt frábrigdi, ið verður brúkt sum brúðgómsvestur.

Uttaná vestinum ber maðurin knappatroyggju – opin framman við silvurknappum báðumegin. Troyggjan verður oftast borin opin, bara fest ovast við einum stuttum silvurstima við knappum í báðum endum. Knappatroyggjan er antin einslitt myrkablá av bundnari og tøvdari ull, ella, sum á frímerkinum, ljósablá við myrkabláum mynstri.

*Anker Eli Petersen*




FO 837-846 Royndarprent

# Jólafrímerkini: Jesus úr Nasaret

## Boðskapurin í trænum

Um prýðingina hjá Edwardi Fuglø í Christianskirkjuni

Á vári 2013 gjørdi Edward Fuglø tíggju relieff í træ til Christianskirkjuna. Relieffini lýsa tilburðir í Jesu lívi, og tilfarið – træ – hóskar jú væl, tá vit hugsa um, at Frelsarin stóð í læru hjá stjúkpápanum Jósefi.

Ein onnur grund til at velja træ sum tilfar er, at træ er dúgliga brúkt tilfar í kirkjuni sjálvari, har til dømis veldiga træloftið í kirkjuskipinum saman við grótlaðaðu útveggjunum minna um veitsluskálarnar úr víkingaøld.

Tað eru eisini tey rundu skjøldrini á síðuni á víkingaskipunum, sum hava gjørt at Edward Fuglø valdi sirkulin sum skap til relieffini.

Í mun til ein málning, so stinga relieffini fram, og skapa djúpar skuggar. Tey eru gjørd til víða og lága fundarhølið í kirkjukjallaranum og máttmikli dámurin í relieffunum er aftursvar til krevjandi umhvørvið.

Sirkulin er eisini eitt ævinleikasymbol og egnar seg serliga væl til eina átrúnaðarliga frásøgn, men rúmar eisini eina listarliga avbjóðing: myndirnar skulu bæði laga seg eftir runda skapinum, men so sanniliga eisini geva tí mótstøðu, og báðar partar hevur Edward Fuglø loyst á meistarligan hátt. Figurarnir boyggja seg eyðmjúkt fyri rundinginum í rammuni, men aðrastaðni standa teir stinnir, sum var ramman ikki til.

Tað verður fortalt stutt og dramatiskt, har róligi og virðiligi persónurin Jesus, sum eitt annað eyga í ódnini, verður umgyrdur av ógvisligum rørslum og livandi andlitum á lærusveinum og mannamúgvum – eitt ekspressionistiskt kapittul í sjálvum sær.

Í andanum hjá popp-listini, heldur Edward Fuglø seg ikki undan tí gerandisliga. Stílurin er "bibliusøguligur": einfaldur, greiður, og trúfastur móti flatanum. Listabúnin hevur havt eitt langt og útvatnað eftirlív, men var eina ferðina kollveltingarligur og sterkur í italskari list í renesansuni, hjá Giotto og hansara eftirkomarum. Teirra list hevur eisini givið Joachim Skovgaard íblástur til freskomálaðu altartalvuna, Stóra gestaboðið, sum relieffini hjá Edwardi eisini senda eina heilsan til.

Relieffini eru tó ikki bert retro. Tey minna um eitt plastiskt landkort við hæddarstrikum, og forskjótingarnar eru so stórar, at alt fær ein upploystan, næstan kubistiskan dám, tá tú sært verkið tætt hjá ella frá liðini. Einfeldi og



Christianskirkjan í Klaksvík
Altartalvuna hevur Joachim Skovgaard málað

fjøltætti leiðast, við tað at søgan verður ríkað av prýðingini, sum tey abstraktu viðarskapini, ofta í ógvisligum rútmum, veita heildini.

Harafturat koma smáar innsetingar av ymiskum fremmandevni t.d. ein kontakt, ein húkur, eitt lás, ein nagli og annað gamalt burturkast, sum umframt súmbolskar avbjóðingar geva trærelieffunum ein dám av kollagu. Hetta eru alt lutir, ið fólk hava givið listamanninum. Sum lutir við serligum týdningi fyri gevaran, so hevur Edward Fuglø latið teir verið partur av verkinum sum viðmerkingar til halgu frásøgnina.

Á henda hátt gerst Jesu lív og líðing serliga nærverandi.

Eisini innihaldsliga er nakað at heinta. Edward Fuglø hevur valt at lata Óveðrið á vatninum mynda byrjanina til Jesu líðingarsøgu, hóast hendingin fór fram langt áðrenn.

Himmalsferðin er eisini avmyndað sum Jesu afturkoma á evsta degi.

Og so er tað ein rúgva av áhugaverdum smálutum. Í Innreið í Jerusalem ríður Jesus einsamallur uttan fagnandi menniskju; einsamallur møtir hann lagnuni. Og so er ein elalítil hjørtur í baksýninum í Jesu dópi, sum sipar til orðini í sálmi 42: "Sum hjørtur tráar eftir rennandi áum, so tráar mín sál eftir Tær, Gud!" So eftir góðari gamlari kristnari siðvenju eru relieffini bæði ein góð søga og tankans føðsla.

Relieffini eru vorðin til í tøttum samstarvi við Sjúrð Sólstein, møplasnikkara og lærara á tekniska skúla í Klaksvík, sum hevur hýst framleiðsluni. Tað er hann, sum hevur staðið fyri tí torføra og krevjandi arbeiðinum við at evna til allar teir mongu partarnar í relieffunum eftir tekningum í lutfallinum 1:1 hjá Edwardi Fuglø.

Við sínari gandakendu blanding av enfeldi og fjøltætti, frásøgn og prýðing, nýtt og gamalt, hugflog og handverk eru relieffini hjá Edwardi Fuglø eitt nýtt høvuðsverk í føroyskari kirkjulist.

Timburmaðurin úr Nasaret hevði nikkað viðurkennandi.



Edward Fuglø, listamaður, greiðir frá
í kirkjukjallaranum í Christianskirkjuni

Og so til endans nøkur fakta:

Tilfarið til relieffini er ein 2 cm tjúkk bjarkarpláta 135 cm í tvørmát, kantað við einum 2 cm breiðum messinglista, upprunaliga fótlistin á útskiftu stólunum í kirkjuni.

Á plátuna eru límað rá, oljað ella málað træpetti (akryl). Tilfarið er grann, afrikonsku viðarsløgini bubinga og zebrano og so ikki at gloyma furan, sum í stóran mun stavar frá fyrrverandi blindrammuni á altartalvuni í kirkjuni. Harafturat koma rekaviður og brúktir jarnlutir o.a.

Myndevnini – sæð frá vinstru og við urinum – eru:

1. Boðanin (Lukas, 1:26-38)
2. Hirðarnir tilbiðja (Lukas, 2:8-21)
3. Jesus tólv ára gamal í halgidómi num (Lukas, 2:41-52)
4. Jesu dópur (Matteus, 3:13-17, Mar kus, 1:9-11, Lukas 3: 21-22, Jóhan nes, 1:29-34)
5. Jesus mettar 5000 (Mat teus,14:13-21, Markus, 6:30-44, Lukas, 9:10-17, Jóhannes, 6:1-15)
6. Lekingin av teimum tíggju spitals kusjúku (Lukas, 17:11-19)
7. Óveðrið á vatninum (Matteus, 8:23-27, Markus, 4:35-41, Lukas, 8,22-25)
8. Jesus ríður inn í Jerusalem (Mat teus, 21:1-11, Markus, 1:1-11, Lukas, 19:28-40, Jóhannes (12:12-19)
9. Jesus gongur við krossinum (Mat teus, 27:32, Markus, 15:21, Lukas, 23:26-32, Jóhannes, 19:17)
10. Himmalsferðin (Lukas, 24:50-53)

Við til prýðingina hoyra eisini seks smáar skreytmyndir, sum eru settar millum vindeyguni. Tær eru útskorin og málað skap, sum virka sum close-up av smálutum frá relieffunum: ein stjørna, eitt lamb, ein súla, ein fiskur, ein krukka og ein dúgva.

Nils Ohrt

Føroysk týðning: Malan Johannesen

# Postgjaldsmerkini 2016

## Tónleikafestivalar í Føroyum




G!festivalurin
Mynd: Fotostudio

Postgjaldsmerkini í ár vísa føroyskar tónleikafestivalar. Uppsetingin er tó ikki klár enn og verða merkini tí ikki víst her.

Tónleikur hevur altíð fylt nógv í føroyskari søgu og mentan og hava Føroyar í dag eitt ríkt tónleikalív innan flest allar tónleikagreinar. Vit hava bæði sangarar og tónleikarar, sum syngja og framføra í heimsklassa. Teir mongu tónleikafestivalarnar seta sín serstaka dám á føroyska summarið.

**G!festivalurin**

Árligi festivalurin í Gøtu er nakað heilt serstakt. Gott nokk verða festivalar fyriskipaðir á øðrum oyggjum og bygdum, men G! Er nakað fyri seg. Festivalurin yvirtekur fullkomiliga bygdina Syðurgøtu. Konsertpallarnir verða bygdir á sandinum og á fótbóltsvøllinum beint uttanfyri vindeyguni hjá bygdarfólkinum. Bygdarfólkið tekur eisini sera væl ímóti festivalgestunum, nakað sum er deiliga øðrvísi ann tann heldur stíva móttøkan, sum festivalgestir møta fleiri staðir í heiminum.

www.gfestival.fo

**Summarfestivalurin.**
Summar Festivalurin er Føroya stórsta tónleikatiltak, og verður hildin í Klaksvík fyrsta vikuskiftið í august, hvørt ár.

Á Summar Festivalinum verður allur miðbýur í Klaksvík innibygdur til eitt stórt tónleikamekka, har tú kanst njóta ein góðan búff við eini bjór, hitta vinfólk, hugna tær í góðari atmosferu, alt meðan teir ymsu tónleikapallarnir hava hvør sín bólk og tónleik, at freista við.

Summar Festivalurin er eisini ein familjufestivalur. Hann leggur eisini serligan dent á, at hava tiltøk til børnini.

www.summarfestivalur.com

**Sørvágs Country og Blues festivalur**
Country & Blues tónleikur er sera vælumtóktur í Føroyum og hevur eisini sín egna festival í Sørvági. Sum tað sømir seg einum rættum country-festivali, so verður grillað yvir opnum eldi og festivalgestir í cowboyklæðum og cowboyhatti dansa linedans á økinum. www.country.fo

**Voxbotn.**
Voxbotn er festivalurin í Havn. 12 tímar við poptónleiki fyri fólk í øllum aldri. Hann verður hildin í Vágsbotni – best staðnum í Havnini. Teir 3-4000 áhoyrarnir eru tryggjaðir eina frálíka festivaluppliving millum søguligu gomlu pakkhúsini í hugnaligum umhvørvinum í Vágsbotni.

www.voxbotn.fo

# Nýggjar frímerkjaútgávur - 26. september 2016




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Toskaskræða** |
| Útgávudagur: | 26.09.2016 |
| Virði: | 50,00 kr. |
| Nummur: | FO 834 |
| Frímerkjastødd: | 30 x 40 mm |
| Snið: | Martin Mörck |
| Prentháttur: | Offsett |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Gjald til innskrivað brøv |







Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Føroysk klæðir*** |
| Útgávudagur: | 26.09.2016 |
| Virði: | 17,00 og 20,00 kr. |
| Nummur: | FO 835 & FO 836 |
| Frímerkjastødd: | 26,5 x 40 mm |
| Listafólk: | Edward Fuglø |
| Prentháttur: | Offsett |
| Prentsmiðja: | OeSD, Eysturríki |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv og stórbrøv til Europa 0-50 g. |

* er eisini givið út sum sjálvklistrandi hefti
við 6 frímerkjum (3 av hvørjum)




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Jesus úr Nazareth** |
| Útgávudagur: | 26.09.2016 |
| Virði: | 10 x 9,00 kr. |
| Nummur: | FO 837 - 846 |
| Frímerkjastødd: | x mm |
| Listafólk: | Edward Fuglø |
| Prentháttur: | Offsett |
| Prentsmiðja: | |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja smábrøv, 0-50 g |

Snið og uppsetan: Posta Stamps. Framsíðumynd: Hanne Magnussen .Prentsmiðja: Trykteam, Danmark

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

/faroestamps